# Kjak



**Katrina í Geil**
*Limur í føroysku Fólkakirkjuni*

## Nýggja Testamenti og kvinnur

Hvør er grundgevingin fyri, at vit kristnu kvinnur ikki kunnu vera við at mynda eina nútíðarhóskandi útgávu av Nýggja Testamenti?

Eg fekk ein hvøkk í morgun, tá eg hoyrdi, at forkvinnan í Javnstøðunevndini vísti á, at tað bert eru menn, ið settir eru í nevndirnar at gera Nýggja Testamenti. Hvussu ber hetta til? Hvør er grundgevingin fyri ikki at hava eina fullgilduga umboðan av teimum kristnu í Føroyum? Vit eru nógvar kvinnur, sum eru í føroysku Fólkakirkjuni og í føroysku samkomunum og veita eitt megnaríkast, kristna samfelagnum í Føroyum at frama. Meti ikki, at tað kristna samfelagið í Føroyum hevði verið so sterkt, hevði tað ikki verið fyri tað ofta ólønta arbeiði hjá teimum tíggjutúsundtals kvinnum, sum á ymsan hátt arbeiða og virka innan ymsu trúargreinarnar. Sum partur av føroysku Fólkakirkjuni vil eg tí fegin vita, hvat grundgevingin er fyri at útiloka hugburðin og meiningina hjá helvtini av føroysku kristnu.



**Levi Mørk**
*býráðslimur*

## Hotspots í nýggju bussleiðini einmælt samtykt

Fyrispurningur er komin frá mær um, at umsitingin kannar møguleikarnar fyri at kommunan veitir alnótaratgongd, gjøgnum sokallaði 'Hotspots' í bussleiðini og samantvinna hotspotsskipanina við nýggju GPS skipanina til teir 16 nýggju bussarnar sum koma at koyra 1. juni 2011.

Málið var einmælt samtykt á fundi í teknisku nevnd í kvøld og harvið fáa teir nýggju 15 bussarnar hja bussleiðini í Tórshavnar kommunu frítt alnótarsamband. Hesa tænastu fær borgarin gleði av 1. juni 2011, tá ið nýggju bussarnar koma til Tórshavnar kommunu.

Somuleiðis arbeiðir teknisku nevnd við øðrum sera viðkomandi tingum innan KT- øki til nýggju bussleiðina, sum eg ikki fari at koma inn á nú, enn at tað fær borgarin eisini gleði av 1. juni 2011.

Hetta er ein stórur politiskur dagur fyri meg, og eg takki umsitingini og býráðslimum í teknisku nevnd fyri teirra tolsemi og hjálpsemi við hesum máli. Eitt er sikkurt, - skulu við fylgja við KT tíðini og við atliti til at fáa ungfólk at trívast í Tórshavnar kommunu og í Føroyum, ja so mugu vit eisini fylgja við nútíðini. Í næstum verður eisini nýggja hotspotsskipanin á Býarbókasavninum avdúkað.

Fyri meg hevur hetta málið allatíð verið ein sjálvfylgja.





## ÓGILDISLÝSING
### Mortifikatión

**Føroya Lívstrygging, boðar frá, at niðanfyri nevndu tryggingarskjøl eru burturblivin:**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 14-000835 | T. W. Regin. S. Johannesen | 14-006665 | Óli Sølvi Joensen | 14-030102 | Katrin Steffensen |
| 14-000862 | Rúni Torbjarnars. Hentze | 14-006747 | Ólavur Jacobsen | 14-030132 | Jóhan Petur Olgarson |
| 14-001154 | Ragna Helena Mikkelsen | 14-006816 | Andreas Poulsen | 14-050003 | Katrin Steffensen |
| 14-001257 | Ólavur Christiansen | 14-006897 | Ingun Joensen | 14-080274 | Jens Pauli G. Nolsøe |
| 14-002652 | Kristian Henry F. Joensen | 14-007020 | Elisabeth Óluva Poulsen | 14-082573 | Sveinur Tróndarson |
| 14-003189 | Edvard Jóanesarson | 14-021331 | Ingunn Eiriksdóttir | 14-090311 | Oddmar Nattestad |
| 14-003743 | Tordur Jóh. J. Niclasen | 14-021439 | Hans Jørgensen | 14-091269 | Jóhan Simonsen |
| 14-003768 | Carl Hilmar Veyhe | 14-021597 | Rasmus Frederiksberg | 14-097150 | Jóhan Heinesen |
| 14-005104 | Marit Thorbek | 14-021761 | Karina Joensen | 14-600021 | Hervør Lamhauge |
| 14-005133 | Jón Heðin Jørgensen | 14-021811 | Rannvá Leonsdóttir | 14-800021 | Jóhan Petur Olgarson |
| 14-005220 | Joen Pauli Joensen | 14-021878 | Maiken Mortensen | 14-808019 | Poulina Djurhuus |
| 14-005740 | Gunnar Mohr | 14-021887 | Jógvan Horn | 14-811001 | Elin Súsanna Jacobsen |
| 14-005820 | Karen Elise Heinesen | 14-021915 | Jógvan Horn | 14-819304 | Kristina M. Reinert Róin |
| 14-006021 | Jegvan Eliasen | 14-022235 | Joel undir Leitinum | 14-843271 | Malan Kirtin J. Viderø |
| 14-006048 | Jónsvein Knudsen | 14-022247 | Eliesar Kastalag | 14-870601 | Ninni Simonsen |
| 14-006134 | Jógvan Pauli Sumb. Olsen | 14-022376 | Robert Thomassen | 14-871059 | Elin Súsanna Jacobsen |
| 14-006280 | Jákup Sigvard Olsen | 14-025312 | Jógvan Horn | | |
| 14-006436 | Robert Jóhan Langgaard | 14-027258 | Ólavur Jacobsen | | |

Tey, ið møguliga hava nevndu tryggingarskjøl í hendi, verða biðin at prógva ognarrætt sín áðrenn 6 mánaðir eru farnir.

Prógvar eingin ognarrættin, áðrenn nevndu tíðarfreist, verða skjølini søgd ógildug, og nýggj tryggingarskjøl útskrivað.

*Tórshavn 6. APRÍL 2011*
**FØROYA LÍVSTRYGGING**




**Marjus Dam**
*Løgtingslimur fyri Sambandsflokkin*

## Útbúgvingar í Føroyum

Vit vita øll, at skeivt rikin politikkur kann vera til stóran skaða fyri eitt samfelag. Vit kunnu nevna fleiri dømir um okkara leiðir. Ísland er at kalla farið rabundus. Í Írlandi stendur illa til. Har fara fólk av landinum í stórum tali. Skeivt rikin politikkur er orsøkin til tað.

Men tað er ikki neyðugt at fara langt av landi, fyri at finna onnur dømi um skeivt riknan politikk, ið ein heil tjóð líður undir. Tað besta dømi er árini, íð fullveldisbakterian herjaði og inficeraði føroyska samfelagið. Tíðarskeiðið, har hendan bakteria fór um landið, hevur higartil kostað føroyska samfelagnum 4 -5 milliardir krónur, ella 250.000 kr fyri hvønn skattgjaldara. Fleiri politikarar royna av øllum alvi at leggja royksløryvir hendan veruleika – ið er eitt faktum. Ómøguligt er at spara ½ til 1 milliard árliga, uttan at avskepla tað føroyska samfelagið.

Føroyingar flyta í dag av landi at nema sær útbúgving, ið fyri ein stóran part verður goldin av danska statskassanum.

Tjóðveldisfólk, ið ikki vilja hava "danskan pening" til útbúgvingar í Føroyum, siga ikki nei til útbúgvingar. Og flestu av hesum flyta glaðbeint niður til Danmarkar, har statskassin rindar teimum SU, útbúgving, møguliga "boligsikring", møgulig frípláss á dagrøktarstovnum, R-stuðul o.s.fr. Soleiðis kunnu vit halda fram. Nøkur lesa eisini uttan fyri Danmark, men eisini við eini avtalu, har Danmark rindar bæði útbúgvingarstað og SU. Tá verður ikki sagt nei-takk.

Ríkisfelagsskapurin gevur tíbetur eisini teimum ein góðan møguleika at fóta sær í lívinum við eini góðari útbúgving. Bert spell, at vit ikki kunnu hava fleiri útbúgvingartilboð í Føroyum innan fleiri relevant øki orsakað av misskiltari nationalismu og inficeran av fullveldisbakteriuni.

Tá ið Fróðskaparsetur Føroya átti at havt eina fíggjarætlan upp á 130 milliónir krónur – høvdu teir 18 milliónir krónur.

Um møguleikarnir í ríkisfelagsskapinum vórðu gagnnýttir betri, høvdu fleiri møguleikar verið hjá ungum føroyingum at tikið fleiri útbúgvingar, heilt ella partvíst í Føroyum. Men tá er neyðugt, at møguleikarnir í ríkisfelagsskapinum verða brúktir, eisini í Føroyum, og ikki bert í Danmark og øllum øðrum londum.